Íslendingurin Johann Olavsson :

# Føroyingar kunnu læra av newfoundlendingum

**OLJUVINNUSAMSTARV TVØRTUR UM ATLANTSHAV**

*Jan Müller*




Hinumegin Atlantshavið, Í New Foundlandi, hava tey nú í meira enn 20 ár leitað eftir olju og ment eina oljuvinnu. Maðurin hjá Eimskip í New Founlandi, Johan Ólafson, sum flestu føroyingar munnu kenna, nú hann starvaðist hjá Eimskip í Føroyum í mong ár heldur føroyingar kunnu læra nógv av tilgongdini í New Foundlandi.

Johan arbeiddi annars í fimm ár í Ruslandi og Eystureuropa, eftir at hann segði Føroyum farvæl. Síðani setti hann seg niður í Norðuramerika og heldur hann fyri: - Tað eru ikki nógv fólk, sum hava livað eystan fyri, vestan fyri og mitt í millum sigur Johan brosandi.

Eimskip hever tvær skrivstovur í Kanada, eina í St.John's og eina í Halifax á Nova Scotia.

Hövuðuppgávur eru tænustur fyri fiski- og oljuídnaðin. Somuleiðis fyri inn- og útflutning av vørum til og frá Kanada.

7 starvsfólk eru í St.John's og 3 í Halifax.

Johan sigur við Sosialin, at Newfoundland er á rættari kós eftir nógv torfør ár síðani toskurin hvarv.

Toskaveiðibann hevur verið galdandi í 10 ár men ongin toskur er at finna herumleiðir.

Í løtuni eru tvey oljufelt í framleiðslu: Hibernia sum er ein ovurstórur framleiðslupallur og fyri tað mesta úr betongi og síðani Terra Nova sum er FPSO, goymslu og framleiðsluskip meinlík teimum stutt frá føroyska markinum.

Í løtunni gera teir so triðju útbyggingina, sum verður FPSO á White Rose okinum.

Oljuvinnan er nú høvuðsvinnan í New Foundlandi. Nógv fólk starvast í vinnunni og um tú koyrir til høvuðstaðin kann man siggja tænustuídnað til olíjuvinnuna alla staðini.

Men hetta er ikki hent "overnight" sigur Johan.

Tað eru umleið 20 ár síðani, at fyrsta oljan blev funnin. -Men eg haldi at tað er gott at hava varisliga menning, soleiðis at alt samfelagið ikki fer atkóka.

Vinnan á New Foundlandi hevur eisini ment seg og er nú á støði vit tað besta í Texas og Norra.

-Men her hava eisini verið vanlukkur og fyri umleið 20 árum sakk royndarpallurinn Ocean Ranger og við honum 84 oljufólk. Tað er ein tann ringasta oljuvanlukkan í Norðuramerika.

Johann letur heilsa øllum føroyingum og vónar, at oljan verður skjótt funnin men leggur okkum eina við ikki at skunda nakað ígjøgnum. -Gevið hesi nýggju vinnu ta tíð henni tørvar fyri at menna seg og ansið væl eftir samfelagnum annars.





*Frá eini av skrivstovunum hjá Eimskip í Kanada*



Statoil
- expertise in the North Atlantic


The Sovereign Explorer drilling for STATOIL in the Faroes Offshore Sector

For several years STATOIL has been supplying goods and services in the Faroe Islands, both on and offshore.

STATOIL is also one of the foremost exploration and production companies on the North-western Atlantic Margin, including the Faroes Offshore Sector.

The Faroe Islands entered the offshore industry when STATOIL drilled the first well Longan 6005/15-1. Statoil has been awarded two Licences in the Faroes.

Other members of the STATOIL groups in these Licences are Phillips Petroleum Europe Exploration Limited, Shell Expro, Petro-Canada Faroes Gmbh, and Anadarko Faroes Company.

STATOIL